# Veteranar við aftur

*Í ítróttarhøpi verður ofta tikið til, at leikarar eru farnir at eldast, tá farið er um tey 30, men soleiðis tykist tó ikki altíð at vera*




*Veteranarnir báðir, Eyðfinn og Høgni tóktust at vera væl nøgdir við finalusessin*

Jákup Mørk

Í seinastu borðtenniskappingini var tað nevnliga soleiðis, at tveir av gomlu leikarunum ræ私ttuliga fingu høvi til at gera vart við seg.

Talan var um teir báðar Eyðfinn Lamhauge og Høgna Larsen, sum annars ikki hava verið aktivir í fleiri ár, men sum kortini megnaðu at leika seg í finaluni í meðaldeildini.

Her máttu teir kortini lúta, so teir báðir fingu ikki endurtikið double sigurin fyri 25 árum síðani, tá teir saman vóru besta borðtennisparið í landinum.

Tey nógvu seinastu árini hava teir tó einki gjørt um seg, tó at fræga úrslitið hesu ferð helst ber boð um, at teir ivaleyst hava roynt seg eitt sindur í onkrum kjallara av og á.

### Ikki teir einastu

Teir báðir eru kortini ikki teir einastu, sum framhaldandi dríva á, hóast árini eru farin at merkjast. Símun Johannesen er framvegis aktivur, og hann man hava veirð fastu fúsur nú í eini 25 ár, og suðuri á Tvøroyri er Sverri Midjord framvegis at síggja við borðið, hóast seinastu gullmerkjuni munnu liggja nakað langt afturi.



*Og her eru teir báðir so »in action«*

# Máltindurin

## 1. deild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ioana Rápa | VÍF | 118 | (38) |
| Regina Rádó | VB | 106 | (31) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 86 | (36) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 81 | (33) |
| Sunrid Gleðisheygg | Tjaldur | 77 | (19) |
| Inga F. Danberg | Neistin | 76 | (21) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 74 | (5) |
| Arnleyð Krosslá | VB | 58 | |
| Gurið Mortensen | VB | 55 | |
| Ann Hansen | Kyndil | 50 | (10) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 49 | (2) |
| Mona Langgard | Tjaldur | 49 | (7) |
| Nicolina Joensen | VÍF | 49 | |
| Ileana Manolescu | Neistin | 48 | (13) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 48 | (13) |




*Friðarligur sær hann út, Sámal Joensen, men tá armurin verður sveiggjaður er annað skil*

## 1. deild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| Sámal Joensen | VÍF | 134 | (27) |
| Heini Joensen | Neistin | 126 | (27) |
| Artur Johansen | StÍF | 112 | (23) |
| Áki Olsen | Neistin | 110 | (14) |
| John Petersen | StÍF | 107 | (31) |
| Bjarni Wardum | Kyndil | 89 | (24) |
| Ingi Olsen | VÍF | 83 | (5) |
| Petur Martin Johansen | KÍF | 79 | (23) |
| Jakob Jónsson | Kyndil | 77 | (2) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 76 | (9) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 73 | (5) |
| Suni F. Johannesen | Tjaldur | 69 | (20) |
| Jákup Dam | KÍF | 57 | (5) |
| Tummas Magnussen | Tjaldur | 57 | (2) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 55 | (6) |

## Støðan 1. deild kvinnur

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 318 | 247 | 71 | 11 |
| 2 | VÍF | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 337 | 293 | 44 | 11 |
| 3 | Neistin | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 278 | 266 | 12 | 11 |
| 4 | Kyndil | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 290 | 249 | 41 | 9 |
| 5 | VB | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 324 | 333 | -9 | 6 |
| 6 | Tjaldur | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 247 | 406 | -159 | 0 |

**Stíf hevur tikið liðið úr kappingini**

## Støðan 1. deild menn

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 474 | 367 | 107 | 19 |
| 2 | Neistin | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 448 | 381 | 67 | 15 |
| 3 | StÍF | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 441 | 382 | 59 | 15 |
| 4 | Kyndil | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 416 | 370 | 46 | 9 |
| 5 | H71 | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 381 | 450 | -69 | 4 |
| 6 | Tjaldur | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 395 | 495 | -100 | 3 |



Viðmerking:

# Skráseting av ferðafólki

*Uppskot til neyvari skráseting av ferðafólki, sum kemur til Føroyar og uppfylgjandi søluarbeiði til tey sum hava vitjað Føroyar*



**1. Generel lýsing**
Orðaskifti seinastu tíðina um ferðavinnu, sum kemur í kjalarvørrinum av, at partur av kanning, sum Ferðaráðið hevur sett í verk, er almannakunngjørd, vísir týðuliga, at føroyingar hava tørv á at finna eina skipan, sum lætt kann geva okkum tær upplýsingar, sum vit sum ferðamannaland ynskja at vita um okkara gestir.

Ferðavinnan er í dag ein vinna á líka føti við aðrar vinnur, men tøl yvir, hvussu nógv íkast henda vinna gevur til landsbúskapin, sær ikki út til at verða eins lætt at fáa fatur á, sum tað er innan aðrar vinnur. Helst er ein partur av trupulleikanum tann, at tað ikki verður mett at verða heilt so lætt at fáa hagtøl yvir ferðandi, sum tað er at fáa yvir eina vøru, sum verður innflutt t.d.

Um hugsað verður um, hvussu ferðafólk koma til landið, so átti tað hóast alt ikki at verið so torført at fingið hesi hagtøl, tí at millum 90 og 100 % av øllum ferðafólkum, sum koma til Føroya, koma ígjøgnum passeftirlitið á hesum báðum støðum:

a) Flogvøllurin
b) Farstøðin

Mítt uppskot er, at tað í hesum báðum passeftirlitum verða uppsettar teldur og printarar, har øll ferðandi verða skrásett við landakotum, sum siga, hvaðani tey koma. Um hendan skráseting skal verða eftirfarandi er neyðugt, at hon verður gjørd í passeftirlitinum, ella at tað onkursvegna verður hildið eyga við, at øll verða skrásett, og at ongin verður skrásettur fleiri ferðir.

Tá skrásetingin er gjørd, fær ferðafólkið eitt skriv, har tey verða boðin vælkomin á sínum egna máli, samstundis sum tey fáa nakrar hentar upplýsingar um Føroyar og ferðavinnu í Føroyum. Harafturat fáa tey nakrar spurningar, sum tey verða biðin um at svara, áðrenn tey fara úr Føroyum. Spurningarnir skulu útgreina ymiskt í samband við teirra ferð í Føroyum. Fyri at fáa fólk at lata spurnarblaðið inn aftur, kundi tað t. d. verið lutakast ímillum innsend spurnarbløð eina ferð um mánaðin.

Hendan skipan hevði sum minimum givið okkum eitt neyvt tal yvir tey ferðandi, og hvaðani tey koma frá. Harumframt høvdu vit fingið upplýsingar um navn og adressu hjá teimum, sum lata spurnarblaði inn aftur, og kundu soleiðis takka teimum fyri hjálpina og hildið sambandið við líka við at senda teimum nýggjastu ferðafaldararnar um Føroyar. Soleiðis kundu vit fingið nógv umboðsfólk fyri Føroyar um allan knøttin. Harafturat kundu vit sum tað týdningarmiklasta av øllum fingið nógvar upplýsingar - alt eftir hvørjir spurningar verða settir - sum kunnu nýtast sum hjálp, tá ætlanir fyri framtíðar ferðavinnuna verða lagdar.

Út frá tí sum er nevnt omanfyri, vil skipanin soleiðis kunna veita fylgjandi upplýsingar um føroysku ferðavinnuna:

- Neyvt tal á ferðandi til Føroyar
- Tjóðskapur hjá teimum ferðandi
- Navn og adressu á ferðandi ið lata spurnarblaðið inn aftur
- Meting av Føroyum sum ferðavinnuland. Hendan meting sum vil verða ein partur av spurnarblaðnum, kann soleiðis nýtast til at menna føroysku ferðavinnuna.
- Vit fáa eitt sera gott amboð við atlitið til at gera røttu marknaðarføringina mótvegis teimum ferðandi.

Samanumtikið kann sigast, at hendan skipan næstan kann geva allar teir upplýsingar, ið vit ynskja. Hjá okkum snýr tað seg um at stilla røttu spurningarnar.

**1. Mannagongdin við skrásetingini**
Fyri at ein og hvør lætt kann skilja, hvussu eg hugsi mær at skrásetingin skal gjøgnumførast, havi eg gjørt fylgjandi uppstilling, lýst grafiskt:

Sum skipanin er lýst í myndini omanfyri, meti eg at skipanin lætt kann fáast at virka uttan ov stóran kostnað. Eftir mínari metan er neyðugt við fylgjandi íløgum/tiltøkum í útbúnað og starvsfólk, fyri at fáa skipanina at virka:

- 2 teldur
- 2 telduprentarar
- Software: Dátagrunnur ið verður gjørdur/keyptur til endamáli
- Ráðgeving til uppseting av teldum v.m.
- Ráðgeving til upplæring av starvsfólki ið skal nýta skipanina

1. Einføld kostnaðarmeting til íverksetan og rakstur av skipanini

Fyri at íverkseta skipanina, meti eg, at kostnaðirnir blíva umleið sum víst niðanfyri:

Talva : Kostnaðarmeting í samband við íverksetan av skipanini.

Talva : Meting av árligu rakstrarútreiðslunum til skipanina.

Sum báðar talvurnar omanfyri vísa, eru allir kostnaðirnir metingar. Eg haldi tó ikki, at kostnaðirnir eiga at liggja langt frá hesari meting. Ætlanin er jú at skipanin skal verða so sjálvvirkandi sum gjørligt. Hetta merkir, at tá spurnarbløðini eru inntastaði í skipanina, er bert neyðugt at fáa nakað av serkønari hjálp til hagtalsviðgerð, sum Hagstova Føroya kann umsita. Hetta meti eg verða neyðugt við atlitið til at skapa neyðugt álit á taltilfari ið skipanin vil kunna geva upplýsingar um.

Fyri at fáa skipanina at virka haldi eg tað verða neyðugt við serkønari ráðgeving. Eg havi tí m.a. eisini vent meg til fyritøkuna Virkisráðgeving Spf. í Runavík, og spurt um tey eru áhuga í at veita hjálp til gøgnumførðslu og av hesari ætlan, og fingið eitt fyribils játtandi svar tí viðvíkjandi. Hetta er tó ikki bindandi, og hjálp kann tí sjálvandi eisini veitast aðrastaðni frá, um ein heldur ynskir tað.

Við hesum í huga fari eg tí at heita á landsins myndugleikar um at arbeiða víðari við hugskotinum, soleiðis at vit kanska er klár til hetta longu til várs apríl/mai, tá ferðafólkið byrjar at koma. At enda vil undirstrikað, at hetta er eitt hugskot frá mær til landsins myndugleikar. Mítt ynski er tí, at hugskotið verður gjøgnumført frá almennari síðu og við almennari stýring, her hugsi eg mest um hagstovuna, men eg stilli fegin mínar royndir innan ferðavinnuna til hjálp, um tað skuldi verið ynskiligt.

Við vón um eina positiva og góða viðgerð.

**Vinarliga**
**Sámal Bláhamar**




# Einki í vegin við hundakrásinum í Miklagarði

*Miklagarður hevur fingið váttan fyri, at salmonella finst ikki í teirra hundakrási*

Ein av teimum stóru føroysku innflytarunum av hundakrási er Miklagarður í Havn. Tey hava nú fingið trygd fyri, at einki er í vegin við teirra hundakrási, sum kemur frá donsku fyritøkuni Chrisco.

Fyri tveimum vikum síðani kom fram, at danska Plantudirektoratið hevði funnið salmonella í hundakrási. Hundar kunnu ikki gerast sjúkir av salmonella, men sagt varð, at fólk vóru í vanda fyri at verða smittað, tá tey góvu hundinum hundakrás, um tey ikki ansaðu væl eftir reinførinum.

Plantudirektoratið fann salmonella í einum triðingi av øllum hundakrási, sum tey kannaðu seinasta kvartal í fjør. Í teimum flestu førunum var talan um útlendskt hundakrás, serliga týskt.

Ein av teimum positivu royndunum kom tó frá einum donskum framleiðara, men hetta er ikki Chrisco, sum Miklagarður fær sínar vørur frá.

Tí verða allar vørurnar frá Chrisco standandi á hillunum í SMS. Tær er púra tryggar.

**ek**